


*Hetta er triðju ferð, at eldur er í umborð á skipunum hjá Thor Shipping. Meðan eldarnir umborð á Athenu ikki hava kravt mannalív, mistu 11 av manningin lívið, tá Hercules brann fyri trimum árm síðan*

# AFTUR ELDUR Í UMBORÐ Á ATHENU

**Um 6-tíðina í morgun kyknaði eldur umborð á Athenu. Eldurin kyknaði í pakkirúminum í bakborðs síðu á skipinum, men um 10-tíðina var tamarhald fingið á eldinum. 98 av manningini er farin umborð á onnur skip**

Leo Poulsen

Á Thor Shipping hava tey havt nógv um oyruni í allan morgun. Reiðaríið fekk boð frá bjargingarstøðini í Falmouth klokkan 06.22, at eldur var kyknaður umborð á Athenu.

Fyrrapartin sendi reiðaríið út tíðindaskriv har sagt verður, at tamarhald er fingið á eldinum, sum var kyknaður í pakkirúminum í bakborðs síðu á skipinum.

Eldurin var so ógvusligur, at skiparin gjørdi av at senda meginpartin av manningini í bjargingarbátarnar, so bert 13 trygdar- og sløkkiliðsmenn eru eftir umborð.

Teir hava tað allir gott, og eru ikki í nøkrum álvarsligum vanda, verður sagt í tíðindaskrivinum.

Stóru ensku tíðindastovurnar – so sum BBC og Sky News – bóru søguna tíðliga í morgun. Bjargingarstøðin í Falmouth fekk neyðboðini frá fronsku bjargingartænastuni, sum hevði fingið tey frá Athenu umvegis sattelitt.

Mark Clark frá ensku Maritime and Costal Agency sigur við Sky News, at vindferðin er fimm til seks vindstig og nakað av aldu er eisini. Í tíðindaskrivinum frá Thor verður tó sagt, at allir 98 av manningini, ið fóu í bjargingarbátarnar, eru komnir umborð á eitt bingjuskip, sum bert var 15 minuttir frá Athenu.

Fyrr í morgun var gitt um møguleikarnar at fáa tyrlur til økið, har Athena er stødd, men av tí at hon var so langt úr landi, kundu tyrlurnar bert vera hjá skipinum í 20 minuttir.

### Rakt av eldi

Bjargingarstøðin í Falmouth sendi beinanvegin út áheitan á øll skip á leiðini um at koma Athenu til hjálpar, og eitt enn ónevnt bingjuskip hevur sum nevnt tikið manningina upp.

Hetta er aðru ferð, at 89 metur langa Athena brennur. Fyrru ferð var í 2007, tá eldur eisini kyknaði í pakkirúminum. Heldur ikki tá hendi nakar mansskaði, og skipið var ikki verri farið enn so, at avgjørt varð at umvæla Athenu.

Tann umvælingin, sum var gjørd í Kina, var júst liðug, og Athena var á veg til fiskiskap, nú óhapp aftur hendi umborð.

Eisini systurskipið hjá Athenu, Hercules, brann í 2007, og har mistu 11 av manningini lívið. Hercules fiskaði í Kyrrahavinum, tá eldur kom í. Tað var eisini Thor Shipping, ið átti Hercules.

Seinastu tíðindini siga, at tað framvegis brennur umborð á Athenu, men at eldurin er minkaður og at manningin hevur tamarhald á støðuni.

Miðlahúsið fylgir gongdini á portalinum og í Rás2.